# BØNARLØTAN

**DESEMBER** **2022** **37. árg.**


## *1. Hósdagur* *Sálm. 56*




## SENEGAL, Tongia
## Lív Poulsen

Umsetingarráðgevin kannar Matteus- og Lukasevangeliið 29. nov. til 10. des. Okkurt skal endurskoðast og lesast alment fyri einum bólki av badyarankefólkum úr ymiskum bygdum, og síðani kann alt Nýggja Testamenti rættlesast og prentast. Vit byrja at merkja tað, sum nógvir trúboðarar siga, at tá Nýggja Testamenti er um at verða liðugt, harðnar andaligi bardagin. Biðið, at Harrin styrkir og varðveitir okkum, og at vit í einleika kunnu koma á mál og fáa Orð Guds út til fólkið.

## KRINGVARPIÐ
4. des.  útvarpsmøti, Ebenezer, Tórshavn
11. des. sjónvarpsmøti, Betesda, Klaksvík

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)
Sunnukvøld kl. 21.00: Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskvøld kl. 21.00: Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Fríggjadagur* — *2. Mós. 12.38-51*

### DANMARK, Kristnastova
### Sólva og Jákup Hansen
Seinasta fríggjakvøldsmøti fyri jól er 9. des. Vit byrja aftur 20. jan. Møtini sunnudag halda fram sum vanligt, uttan jóladag - tá er einki møti. 2. jóladag hava vit jólasamkomu kl. 14; meira kunning kemur á facebooksíðuni hjá Kristnastovu.

### Susan og Øssur Berghamar

## *3. Leygardagur* — *Jóh. 9.24-41*

### Elam Ministries, Evropa
### Margretha Højgaard Poulsen
8. des. endar online bíbliuskeiðið fyri iranar/afghanar. Eini 150 nýggj trúgvandi úr ymiskum londum í Evropa hava tikið lut 8 hóskvøld, summi saman við samkomubólkum, onnur einsamøll. Í Iran er álvarsligur ófriður. Takk, at tit biðja.



### ZAREPTA

## *4. Sunnudagur* *2. Mós. 13.1-22*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Tanja hevur nú ábyrgd fyri starvsfólk og umsiting í AIDSHOPE hjá OM Suðurafrika. Logos Hope er í Kýpros og fer til Libanon 15. des. Esther Dam Hansen, Hans Elttør og Martin og Siri í Grund eru umborð. Biðið fyri skipinum, øllum umborð, og at gleðiboðskapurin røkkur tey, ið vitja umborð. Í des. fer OM at savna pening inn til Ukraina. Biðið fyri Ukraina og Russlandi.



**FØROYAR**

**– Else og Poul Johan Djurhuus**

**– Anna Maria og Rógvi Joensen**

**– Khuldah og Sámal Mikkelsen,**
**Josva 13, Ester 12, Samuel 8**

## *5. Mánadagur* *Jóh. 10.1-21*



**FØROYAR**

**Shamila og Høgni Johannesen**

**Adonia 14**

Møtir og hirðatænasta eru fyri framman. Biðið áhaldandi fyri fyrireikingini av STEVN. Vit verða í Pakistan í des.

**DANMARK, Odense**

**Árni Helmsdal**

Vit eru nøkur, sum fríggjadagar seinnapart eru á gøtuni við evangeliinum.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**




**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Týsdagur* — *2. Mós. 14.1-14*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Biðið fyri okkum og toyminum frá St. Andrews, nú vit leggja síðstu hond á at endurskoða Markusevangeliið. Útgáva verður væntandi triðju viku í des.

## *7. Mikudagur* — *Jóh. 10.22-42*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2**
Takk fyri forbøn. Tað gongur framá at læra indonesiska málið. Vit vænta, at langtíðarvisa endiliga verða í lagi. Um hálvan des. fara vit í brúdleyp hjá systur Krissy, har vit steðga til hálvan jan. Biðið, at ferðin verður til signing fyri familjuna og heimasamkomuna.

## *8. Hósdagur* — *Sálm. 57*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vit verða í Filipsoyggjum allan januar, har vit hava skeið fyri útlendskum og filipinskum leiðslum um arbeiðið í landinum, og hvussu samstarvið kann styrkjast. Síðani verða vit einar tveir dagar í Singapore, har vit tosa við umboð okkara har. Síðani skulu vit hitta indonesisku leiðsluna í Jakarta. Judy og eg skulu eisini vitja nakrar ættarbólkar á Mindanao oynni. Biðið fyri okkum, nú vit fyrireika ferðina.

## *9. Fríggjadagur* — *2. Mós. 14.15-31*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Jólakonsertir verða 11. des, jólahald fyri menningartarnað verða 10. og 13. des, og jólaaftan verða tríggjar jólagudstænasur. Vit vænta nógv fólk. Biðið, at nógv koma til persónliga trúgv.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 5**

## *10. Leygardagur* — *Jóh. 11.1-16*

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 11, Tabita 8, Debora 7, Natan 4**

Tey ónáddu vaksa í tali hvønn dag. Tað er vandamikið og trupult at virka, har tey búgva. Men Gud arbeiðir í hesum økjum og ynskir at frelsa tey. Jesus segði: “óttist ikki!” Biðið,

at Harrin sendir trúboðarar at gera øll fólkasløg til lærisveinar. Reach ráðstevnan er í North Cotes 22-24. mars 2023.

## *11. Sunnudagur* *2. Mós. 15.1-27*

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**
Vit umseta nú Jóhannesevangeliið. Minnist okkum, sum arbeiða við hesum, t.d. bíbliuráðgevum. Biðið eisini fyri EDCBT, at fleiri verkætlanir verða settar í gongd í Evropa.

## *12. Mánadagur* *Jóh. 11.17-44*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**
Virksemið í Onesimusarhúsi umfatar: fundir fyri ung saafitrúgvandi, fundir fyri menn frá ymsum bygdum at stuðla teimum í at vaksa í trúnni og byggja sambond, bønarløtur, eftirmeting og ráðlegging.



*Í dag fyllir Noah Kristian Joensen 9 ár



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 16, Rebekah 14, Lydia 12**

## *13. Týsdagur* *2. Mós. 16.1-21*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 14, Jónatan 13, Markus 10, Evita 7, Joy 5**

Biðið fyri samkomuni í Puruandiro, meðan vit eru í Danmark.

## *14. Mikudagur* *Jóh. 11.45-57*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**



Legurnar 2023: 29. juni til 6. juli barnalega; 6-13 juli ungdómslega, so Outreach í Nuuk; 23-31. juli familiulega.

Hjálparfólk: tilmelding hjá Ragnhild í Skorini, +299 486448 ella via facebook, ella hjá Sofus Gregersen, +298 771715. Vit útvega nógv bíligari ferðaseðlar til teirra, sum melda til nú!

## *15. Hósdagur* *Sálm. 58*

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

Ferðin hjá Juvel ll í Grønlandi í ár var sera væleydnað - Harrin signaði verkið. Fleiri játtaðu trúgv á Jesus. Fyrireikingarnar til 2023 eru byrjaðar. Biðið, at manning verður tøk til komandi ár, og at neyðugar umvælingar verða gjørdar í vetur og til várs.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**



**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**

*Í dag fyllir Louie Mortensen 9 ár

## *16. Fríggjadagur* — *Mika 1.1-16*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
**-Anna og Óli Steinberg**
Ferðin í Kitsissuarsuit (Hundeøerne) gekk væl. Hetta var fyrstu ferð, eg hevði møti einsamallur. Átta fólk vóru á møti fyrra kvøldið og sjey seinna kvøldið. Síðani vitjaði eg í Qaqortoq hjá Páll Poulsen, sum var áhaldsin og breyt mjødnina. Fleiri bygdir vórðu tí ikki vitjaðar, men eg hjálpti at gera bæði legurnar og Juvel klár til veturin.



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Atlantic Mission, Juvel II
Samarbeiði er fingið í lag við leiðsluna fyri umlættingarheimið URD í Hoyvík. Skipað verður fyri sang- og andaktsløtu mikudag

kl. 16.30-17.15. Sangbólkar og sangarar skiftast fimta hvønn mikudag. Fólk á stovnum og sambýlum eru sera glað um hesar løtur. Sjálv vitja vit eisini eldrabýli og stovnar. Umframt hava vit vitjað samkomur at greiða frá ætlanini at seta á stovn kunningar- og minnissavn um William Gibson Sloan, sum ein samkomunevnd arbeiðir við.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Jenny 14, Svend 13, Terji 10, Petra 8**

## *17. Leygardagur* — *Mika 2.1-13*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 13**



Vit verða saman við familjuni um jólini. Biðið fyri okkum, nú vit fyrireika okkum at fara aftur til Senegal. Vit flúgva 2. jan. 2023.

## *18. Sunnudagur* — *Lukas 1.1-25*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

25. des. hava vit árliga jóladøgurðan fyri tey, ið vit síggja javnan og sum eru bundin av rúsevnum. Ein teirra er 26 ára gamal unglingi, sum vit hava kent seinastu trý árini. Biðið, at sáaða orðið skal bera ávøkst, áðrenn tað er ov seint. Her

eru nógv, ið lata lív av rúsevnum. Bara Harrin kann veruliga broyta lív teirra.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**
Samkomulegan í nov. var fullsett og ríkliga signað. Vit fyrireika okkum nú til samkomutiltøk og møtir um jólini. Biðið, at Harrin talar til okkum og tey, ið ikki enn kenna Hann.

## *19. Mánadagur* — *Mika 3.1-12*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Samkomurnar gleðast um, at tey í ár kunnu bjóða til jólahald. Biðið, at nógv taka av innbjóðingini, og at tey mongu søkjandi taka við gleðiboðskapinum. Vit biðja um signing og leiðslu fyri 2023.

*Í dag fyllir Leah Mortensen 9 ár

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

## *20. Týsdagur* — *Lukas 1.26-58*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 11, Louie 9, Rio 3**
Vit hava tvey jólatiltøk í des.: Eitt fyri børnini, ið ganga til

enskt, og foreldur teirra. Jóladag hava vit jólamøti og jólafest, har vit bjóða grannum við. Biðið, at Gud signar.

## *21. Mikudagur* *Mika 4.1-14*



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**
Vit vitjaðu fleiri samkomur í Nova Scotia í nov. og greiddu frá um arbeiðið á Filipsoyggjum. Vit halda jól í Klaksvík og vitja samkomur, meðan vit eru heima í jan. og nakað av feb.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 17, Hanna 14**

## *22. Hósdagur* *Sálm. 59*

**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**
Vit hava ferðast nógv í farna ári, og tað hevur ikki verið vandaleyst, men Harrin varðaði. Barnabarn okkara Zoe er enn sjúk og er til kanningar í Bristol. Vit vóna at verða í Føroyum 6-26. jan. og vilja fegin vitja samkomur. Sigið frá hjá bróður Dorit Heðin Poulsen, hedinp@gmail.com

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**

*Í dag fyllir Zephaniah Hansen 2 ár

## *23. Fríggjadagur* *Lukas 1.59-80*



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Eg skal undirvísa á bíbliuskeiði í Nýsælandi fyrst í jan. og fyrireiki hetta nú í des. Skeiðið verður 18 tímar í eina góða viku.

## *24. Jólaaftan* *Mika 5.1-14*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**

Vit eru takksom fyri tíðina her í Týsklandi og øðrum evropeiskum londum seinastu 6 mán. Síðst í des. fara vit til USA at vitja familju, vinir og samkomur í 3 mán., áðrenn vit aftur fara til PNG og kovolfólkið. Biðið fyri umskiftinum hjá sonunum. USA er fremmant fyri teir, so tað verður ein avbjóðing. Teir gleða seg at koma aftur til Kovol.

## *25. Jóladagur* *Lukas 2.1-21*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 10, Emma 6**

Vit venda skjótt heim aftur til Italia, og vit takka Gudi fyri hetta hálva árið saman við mammu Regin og saman við vinum og samkomum.



## *26. 2. Jóladagur* — *Lukas 2.22-38*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Vit eru ómetaliga takksom fyri signingar Guds. Hvørja viku koma nýggj fólk til møtini. Sunnudag eru samkomuhølini oftast full, og onnur tiltøk fylla eisini hølini. Biðið, at vit kunnu víðka um hølini í 2023.

## *27. Týsdagur* — *Lukas 2.39-52*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 2, Olivia 0**

Vit hava nú fingið pass til dóttur okkara Oliviu, so nú vantar bara innfararloyvið. Vit siga nú farvæl við familju og vinir. Tað verður ein avbjóðandi skiftistíð fyri børnini.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Mikudagur* — *Lukas 3.1-14*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit eru framvegis við at koma upp á pláss í nýggjum umstøðum í Kalifornia. Takk fyri alla forbøn fyri okkum og fólkinum í Qasigiannguit.

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 9, Abigail 4**

## *29. Hósdagur* *Sálm. 60*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**



Eg arbeiði við tilfari, ið verður sent til eftirkanning, áðrenn eg fari næsta túrin til Sorimi, har vit gera endaligu eftirkanningina av tilfarinum. Biðið, at alt skal ganga væl.

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 17, Aron 10, Noah Kristian 9**

## *30. Fríggjadagur* *Lukas 3.15-38*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9, Judah 7, Ethan 5**

Meðan vit eru í farloyvi eru børn okkara til læknakanningar og viðgerðir. Biðið, at tey falla væl til og fáa vinir. Vit gleða okkum, at vera saman við familjuni Poulsen. Biðið fyri Mengensamkomuni og bíbliulærarunum, at teir eru trúfastir

hirðar, og fyri Vincent, Anton, Kamalus, Brus og familjum teirra, nú teir læra og hava umsorgan fyri samkomuni. Biðið, at vit verða før fyri at stuðla samkomum til missión og djúpari samfelag við Gud.



## ONGLAND, NTM North Cotes
## Julie og Sonni Poulsen


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |



NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**491 síður 250 kr.**

Í 2019 gav Leirkerið út bókina *Viðmerkingar til hvønn kapittul í Nýggja Testamenti.*

Nú er *Viðmerkingar til hvønn kapittul í Gamla Testamenti (fyrri partur: 1. Mós. - Ester)* komin.

Warren Wiersbe skrivar eitt stutt brot um hvønn kapittul. Bókin kann eisini nýtast sum andaktsbók.

Páll á Lakjuni týddi úr enskum.




Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið týs.–frí. kl. 14.00–17.30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos

**GOTT NÝGGJÁR!**

***Jesus Kristus er hin sami í gjár og í dag og í allar ævir. Hebr. 13.8***